## VIÐMERKINGAR

# Kollveltið granskingina!

**Ásmundur Guðjónsson**
*Svínoy, 11. januar 2003*



### Framhald - seinni partur

Í samfelagskjakinum kemur týðun fram, at meira eigur at gerast við at framleiða vitan um tað ella tað øki og evni. Eitt dømi. Finnbogi Ísakson hevði nakað fyri jól eina grein í Fregnir um sparingarnar á fíggjarlógini. Hann nevndi, at skuldi sparast av týdningi, so slapp mann ikki undan at hyggja efti trivnaðar-, heilsu- og undirvísingarøkjunum, tí hesi standa fyri 75% av fíggjarlógini. Kjartan Hoydal viðmerkti, at ein trupulleiki við hesum er, at vit hava yvirtikið skipanir á hesum økjum, sum eru seymaðar til samfelag, sum er 100 ferðir størri enn okkara. Tað er eyðsæð, at vit her hava ein so stóran trupulleika, at politikarnir standa meira og minni ráðaleysir, tí tað, sum gerast skal, er stórt og torgreitt. Haldi, at í slíkum førum áttu granskingastovnar at fingið til uppgávu, at greina út alternativar strukturar og fyrisitingarhættir og eisini hvussu avleiðingarnar av teimum merkjast í samfelagnum og ikki minst hjá einstaklinginum. Enn er tað soleiðis, at politikarnir bert kenna til plenuklipparaella salamimetodurnar, tá tað um sparingar ræður. Men tað er samstundis ongin, sum heldur hesar metodir verða serliga skilagóðar uppá longri sikt og tí er tað alneyðugt at aðrir mátar síggja dagsins ljós.

Tað er rímiligt, at máларáðini hava ein posa av pengum til at menna vitanina um sektorin og kunnu gera langtíðaravtalur við granskingarstovnar um nærri lýstar uppgávur. Men hinvegin er ikki sagt, at hvørt málaráð skal hava sín stovn. Málaráðini eigi ikki at verða bangin fyri at gera avtalir við stovnar, sum annað málaráð varðar av, tí tað er øll grund til at royna at fasthalda, at sama granskingarøki ikki er deilt á fleri stovnar. Til dømis er onki forgjørt í, at Trivnaðarmálaráðið letur Granskingardepilin hjá Mentamálaráðnum gera ávísar kanningar fyri seg um hesin er skikkaður at gera arbeiði.

**Fleiri vinnubollar í suppuna!**

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur í bóklinginum "Vinnusjónarmið" drigið samanum nakrar áskoðanir um gransking í Føroyum. Høvuðsboðskapurin er, at tørvur er á at endurskoða granskingrumhvørvini, har hugt verður eftir endamálið, bygnaði og hvussu vit kunnu koma framá. Hesar áskoðanir eru sera viðkomandi og áhugaverdar og eiga at verða tiknar til eftirtektar.

Hinvegin eru „Vinnusjónarmið" heldur veik, tá tað umræðir hvat vinnan sjálv vil og kann á granskingar- og menningarøkinum. Tað verður staðfest, at vinnan ikki er serliga nógv við í G&M virksemi og tað tykist líka sum, at vinnan orsakar sín afturhaldandi leiklut í hesum við, at fyritøkurnar eru ov smáar og peningaligar veikar. Passiviteturin hjá vinnuni verður eisini forkláraður við, at tað almenna sjálvt setir ikki so nógvan pening í granskingina.

Haldi, at tað eiga at koma nýggir bollar í suppuna. Nógvar føroyskar fyritøkur er peningaveikar sammett við fyritøkur uttanlanda, tað kann verða nakað um tað. Hinvegin hava vit tó nakrar størri fyritøkur innan fyri fiskivinnuna og alivinnuna, sum kunnu gera nakað munagott, um viljin er til tess.

At fyritøkur eru smáar og peningaveikar er eisini heldur veikt argument fyri afturhaldni, tí júst tað, at fyritøkurnar eru smáar og peningavekar eigur at vera eitt sterkt argument fyri at at herja á framtíðina. Her eiga branchuskipanir sum til dømis Ráfiskakeyparafelagið og Havbúnaðarfelagið sín náttúrliga leiklut sum kveikjarar og sambindingarlið.

Í hvønn mun vinnan skal luttaka í fíggingini av granskingar- og menningarvirksemi er eitt evnið, sum er til kjak í øllum londum. At vinnan skal verða við so ella so, er ongin ivi um, tí tað er eisini vinnan, sum skal heysta av tí íløgu, sum verður gjørd í G&M-økið. Okkara vinnufeløg (í øllum førum innan fiski- og alivinnuna) eiga at umhugsa gjølla, at kanna møguleikan fyri at seta gongd á egið G&M-virksemi. Á hvønn hátt hetta kundi verið gjørt, verður upp til vinnuna. Tað kundi verið ein G&M-grunnur sum til dømis tann norski. Ein slíkur grunnur hevði havt ómetaliga stórt virði í G&M menningini og ikki minst sum politiskt signalvirði til myndugleikarnar um at taka alt G&M-øki til politiska endurskoðan.

**Endi**

Í kjalarvørrinum av fíggjarlógarviðgerðini kom fram frá fleiri síðum av, at fólk eru farin at spyrja seg sjálvan og politikararnar, hvør meiningin er við tí heila. Pleniklipparin, sum jú er einasta politiska instrument samgongan tykist at hava tøkt, er farin at klippa niður í svørðin, nú onki gras er eftir.

Tað sveið í fleiri støðum innan tað almenna - eisini í G&M-økinum. Til dømis var tann reella minkingin av "grunna"játtanunum til Fiskimálaráðið sløk 40 % í mun til játtanina fyri 2002.

Hetta bendir á, at kjakið um innihaldið í G&M í føroyska samfelgnum hevur størri týdning nú enn nakrantíð, tí so leingi sum innihaldið í G&M er so veikt, er jú lag á manni hjá fíggjarnevndini at gera seg inn á karmarnar.

*Framhald á síðu 13*

### TALVA 1. Orðingar um Gransking og Menning úr Samgonguskjalinum

**Úr samgonguskjalinum fyri sitandi samgongu:**

**Heilsumál**
Lóggevast skal um ílegu- og biotøknigransking í Føroyum.

**Fiskivinnumál**
Framtøk skulu gerast innan útbúgving og gransking í samstarvi við vinnuna til at økja um úrtøkuna og at eggja ungfólki at starvast í hesi vinnu í menning.

**Vinnumál**
Miðast skal eftir, at kunningartøkni, bio- og gengransking verða hornasteinar í búskapinum, har samanrenning millum vitan, samskifti og kunningartøkni verður ásin, sum framburðurin á økinum melur um.

Byggjast skal starvsstova, har sjúkrahús, apotek, Heilsufrøðiliga Starvstovan, Elek-tron, aðrar teldufyritøkur og privatir íleggjarar samstarva á felags palli innan gengransking, lívfrøði og evnafrøði.

Kynsbót, eftirlit og sjúkufyribyrging verður stuðlað í sama mun sum hjá okkara kappingarneytum. Virkast skal fyri, at menna gransking og aling av øðrum fiskasløgum.

**Mentamál**
Miðvísar íløgur í vitan, kunnleika og skapandi evnir eru neyðugar í føroyska samfelagnum komandi árini.

Fróðskaparsetrið skal hava hóskandi karmar og hava møguleikar at geva fleiri útbúgvingartilboð.

Útbyggingarætlan fyri Fróðskaparsetrið verður kannað.

Útbúgvingarnar, sum liggja millum miðnám og hægri lesnað, verða umskipaðar til hægru útbúgving-arnar.

Virkað verður fyri, at útbúgvingarmøguleikarnir hjá føroyskum lesandi úti í heimi verða støðugt styrktir.

**Umhvørvismál**
Føroyar skulu taka lut í altjóða samstarvi við atliti at felags átøkum, ið minka um dálkingina, menna umhvørvisverndina og økja um burðardygdina.

### Talva 2. Yvirlit yvir vitanarstovnar og "Grunnar"

| | |
|---|---|
| Stovnar | Kanning av djórasjúkum |
| "Grunnar" | Menningarstovan |
| Fróðskaparsetrið | Havbúnaðarroyndir |
| Granskingargrunnurin | TK stovan |
| Biofar | Vinnuframagrunnurin |
| Mentunargrunnurin | Heilsfrøðiliga Starvsstovan |
| Økismenningardepilin | Umhvørvisverndartiltøk |
| Granskingarætlanir | Jarðfrøðissavnið |
| Føroya Landskjalasavn | Skógrøkt landsins |
| Hvalagransking | Deildin fyri arbeiðsheilsu |
| Føroya Fornminnissavn | Búskaparráðið |
| Fiskivinnuroyndir | Hagstovan |
| Føroya Náttúrugripasavn | |
| Fjølbroyttur floti | |
| Fiskirannsóknarstovan | |
| Fiskivinnumenning á landi | |
| Royndarstøðin | |

### TALVA 3. Stovnsjáttanir og og "Grunna"játtanir býttar eftir málaráði

**Uppskot til fíggjarlóg fyri 2003**

| Ráð | tal af stovnum | játtan | tal av "grunnum" | játtan | íalt |
|---|---|---|---|---|---|
| Fiskimálaráðið | 1 | 23.634.000 | 5 | 21.837.000 | 45.471.000 |
| Vinnumálaráðið | 4 | 37.842.000 | 3 | 20.672.000 | 58.514.000 |
| Mentamálaráðið | 6 | 40.169.000 | 2 | 10.778.000 | 50.947.000 |
| Heilsumálaráðið | 1 | 4.123.000 | 0 | 0 | 4.123.000 |
| Trivnaðarmálaráðið | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Oljumálaráðið | 2 | 11.670.000 | 1 | 1.900.000 | 13.570.000 |
| Fíggjarmálaráðið | 2 | 7.358.000 | 0 | 0 | 7.358.000 |
| Løgmálaráðið | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Løgmannsskrivsst. | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| | 17 | 124.796.000 | 11 | 55.187.000 | 179.983.000 |



## VIÐMERKINGAR

*Framhald av síðu 12*

Ávegisstøða 2008.

Soleiðis kundi støðan viðvíkjandi menningini av G&M verið í 2008…….

Eitt granskingarálit er skrivað, sum mælir til at fara radikalt til verka. Álitið hevur verið til samfelagsliga hoyring og aðalorðaskifti hevur verið í tinginum. Drúgt orðaskifti stóðst av álitinum. Stór undirtøka fyri álitinum og serliga fiski- og alivinnan viðmælti tí.

Kjak og broytingar eru innan almennu stovnarnar. Fleiri garðar eru rapaðir og aðrir eru á veg. Fleiri stovnar eru lagdir saman og aðar samanleggingar eru á veg, so roknað verður við, at málið, um í minsta lagi at halverað talið av stovnum verður nátt innan 2010. Endamál stovnanna er endurskoðað í mun til granskingarálitið og saman við spardu krónunum, sum samanleggingarnar hava givið, er okkurt granskingarøki komið afturat.

Fýra granskingarøkir eru við at vera staðsett, men enn eru barnasjúkur at fáast við.

<u>Havfrøðiliga økið</u>, har marina lívfrøðin , streymur og oceanografiin er samlað. Fiskirannsóknarstovan, Náttúrvísindadeildin og Biofar eru longu samanløgd

<u>Sjómatur og heilsa.</u> Hetta øki er ma ein samanrenning av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, Heilsugransking og Apoteksverkinum.

<u>Okkara mentuararvur.</u> Hetta sentrið er ein samanrenning av teimum fýra søvnunum, Føroyamáls- og Siðsøguligu deildunum á setrinum.

<u>Samfelagsliga og búskaparliga økið</u>. Samfelagsliga deildin á Setrinum og Økismenningardepilin eru samarunnin. Hetta økið hevur fingið flest pengar av teimum, sum spardir eru aðrastaðir.

Stovnsjáttanirnar eru framvegis á 125 milliónum. Ein samlað evaluering skal gerast av stovnunum í ár, so ein fær at síggja, um mælt verður til størri ella minni granskingarjáttan til vitanarstovnarnar. Enn er eitt sindur av turbulensi í stovnunum orsakað av niðurløgdum granskingarøkjum, samanleggingum og ikki minst, tí ein nýggj jávnvág skal finnast millum G&M-virksemi og tað stovnarnir harumframt fáast við.

Setrið eru fyri størstu broytingini. Tað hevur fingið heilt nýggjar uppgávur og aðrar eru lagdar niður og/ella fluttar. Granskingaruppgávurnar eru lagdar út til sektorstovnarnar og Setrið er nú vorði ein skipanarligur paraplystovnur fyri allir sektorstovnarnar við tí, sum har í hongur. Setrið tekur sær formliga av øllum hvøuðsfak og PhD lestrunum, skeiðvirksemi í hesum sambandi og tekur sær allari útgávu av tí framleiðslu, sum sektorstovnarnir lata úr hondum til útgávu í Føroyum.

Eisini eru rembingar í Heilsfrøðilgu Stavsstovuni. Kjakað verður um hvørvítt eftirlitsuppgávurnar skulu leggjast saman við líknandi virksemi á øðrum stovnum til eina tekniska fyristing . Harafturat verður kjakað um, hvussu tey meira vinnuligu granskingarøkini kunnu staðsetast á stovninum.

Fiskivinnan og Alivinnan hava megnað at seta ein G&M-grunn á stovn, har eitt ávísur prosentpartur av útflutningsvirðinum verður settur í. Seinastu tvey árini hevur innskotið í grunnin ligið um 25 milliónir árliga.

Tað almenna "Grunna"kompleksið er endurskoðað. Endurskoðanin viðførdi, at grunnarnir gjørdust meira málrættaðir í sínum endamáli, og einstáttaðir í fyrisiting. Fyribils er ein grunnur fyri hvørt málaráðið, tað vil siga at Fiskimála-, Vinnumála- og Mentamálaráðini hava lagt sínar játtanir í ein grunn hvør og hini málaráðini hava stovnað hvør sín Eitt grunnahús er stovnað, har fyrisitingin av øllum grunnajáttanunum er samlað.

Stórt kjak stóðst um grunnarnir og hvørja játtan teir skuldu hava. Men eftir at vinnan hevði gjørt sín grunn kom glið á málið. Grunnajáttanin er nú komin upp á 100 milliónir tilsamans, har Fiskimálaráðið og Vinnumálaráðið tó standa fyri helvtini. Ætlanin er at fáa játtanina til gunnarnar upp á 150 milliónir innan trý ár.

Stórt kjak hevur verið um vit skulu hava eitt nýggjan stovn ella fyritøku til vinnurættaða gransking og menning í framleiðslutøkni, veiðitøkni, biotøkni, KT og øðrum. Talan hevur verið um, at bæði vinnulív og tað almenna skulu seta pening í hesa fyritøku. Framtaksgrunnurin er eisini inni í myndini í sambandi við stovnsetanini av hesari fyritøka.

# Hugleiðing

**EIN HUGLEIÐING**
*Kim Simonsen*



**Um vit leita okkum aftur til gomul føroysk tiðarrit, mong skrivað í útlegd millum, tá ung progressiv lesandi og hugsandi føroyingar, er hetta ótrúliga áhugavert. Sjálvandi stendur mangt púra svakt í slíkum bløðum, soleiðis var tíðarandin, her er mong pínlig og vánalig sosialistisk arbeiðarayrking av okkara nú mætastu yrkjarum og høvundum, mong greinin, ið er so ektrem, at Fidell sjálvur kundi verið høvundin, saman við einari stívari lesing av Marx, Lenin og hinum dreingjunum frá sosialistiska internationale.**

Lætt hevði verið at tikið alt hetta fram og kastað við runu, og her er nógv runa, men í hesum bløðum er eisini ein mangan klár linja, móti USA, krígginum í Vietnam, tøgnmentan í Føroyum, greinar um heimspolitikk, har hesi ungu fólk veruliga høvdu sett seg inn í søguligu viðurskiftini í hesum londum og roynt at skriva perspektivrík og tung uttanríkistíðindi, nakað vit sakna í føroysku fjølmiðlunum í dag. Ein hevur tí hug at spyrja, hvar fóru hesi fólkini, og um hetta ikki var ein føroysk mentanarradikalisma?

**Kritikkur av tí privata**

*"Hjúnabandið, sum er tann størsta eydnan, ið hugsast kann í Føroyum, er ikki annað enn ein staðfesting av tí kúgan, sum fer fram. Tað skuldi ikki verið kalla hjúnaband, men konuband. Tað bindir konurnar bæði økonomiskt og moralskt. (…) verða økonomiskt kúgaðar og forkrypladar niður í ein form fyri menniskjaliga eydnu, sum man kallar hjúnabandið …."*

*Jens Dalsaard,*
*Framin nr. 1, 1971*

Ein fær hug at hugsa um kenda sangin hjá Poul Henningsen frá 1940: "Man binder os på mund og hånd", ið Liva Weel sang so vakurt til lagið eftir Kai Normann Andersen. Tað henda vísa staðfesti, var at (borgarliga) giftarmálið ikki kundi temja hug okkara á frælsi og ævintýri. At tað at vera giftur var mangan ein óeyðna, ið var sett í skipan av einum harðhentum kúgandi samfelag. Ein slík vísa er enn óhugsandi her í Føroyum 63 ár eftir at hon kom fram, hetta tí vit ikki hava somu mentanarradikalu frástøðuna til vanligar "føroyskar" stovnar sum giftarmál, fólkið, tað fólksliga t.d. Sjálvani møtti hendan, sum aðrar P.H. vísur stóra motstøðu, men mentanarradikala fjøldin var sterkari í Danmark enn mótdrátturin, og kom at enda at skriva sjálva søguna. Tað er okkurt garrvilt við hesum, í føroyskum høpi, ið Jens Dalsaard sigur, men eg haldi at slíkt vekjur eftirtankar. At vit kanska í Føroyum enn liva sera siðbundið, og tí hava gjørt brúðleyp og giftarmálið til eitt nærum absolut mál og rammu fyri menniskjaliga eyðnu. Soleiðis er tað eisini í Iran, millum mormonar og í bíbliubeltinum í USA. Hin vegin tosa vit ikki um umkostningarnar av hesum, at júst í hesi tíð eru fleiri, ið skiljast enn nakrantíð í føroyskari søgu. At alt fleiri liva støk, ella einsamøll við børnum. At tað er púra vanligt at gifta seg fleiri ferðir í Føroyum í dag, sum í restini av Vesturheiminum annars.

**Speisemi og skemt**

Tað, sum er løgið, er, at vit ikki hava eina sterkari sang- og kabaretmentan, ið hevur tikið sær av at syngja um annað enn tjóðarhetjur og hálovan av føðilandinum. Undantøk eru sjálvandi, her komi eg at hugsa um Studentakabarettirnar, serliga Ólavssvøkukabarettirnar, har sangir sum "16 ár" og mangt av tí sum Harkaliðið seinni kom at framleiða, var slóðbrótandi og nýskapandi. Men hesin andin er horvin, í dag hava tey ungu eina nærum sakrala støðutakan til alt føroyskt, um tað so er at brongla kingosang. Hesin baroksálmayrkjarin, ið tilvildarligani skuldi yvirliva saman við miðøldini í Føroyum, og saman við einum myrkum kristindómi hylja tær miðaldrarligu Føroyar inni í einum myrkuri fram til okkara tíð, skal nú hálovast av einari neonationalistiskari mentanarelitu, har hesi rópa sum stungnir grísar um at "kongosangur" er partur av "okkara" føroysku nútíðarmentan. Hetta er ikki nútíðarmentan, men ein eksotisma og hetta er søga, ikki mentan. Ella ein roynd at gera søgu til nútíðarmentan. Kingo er bókmentasøga, ein fínur sálmayrkjari úr 1600talinum, ikki sjálvur mondulaksilin í føroyskari mentan. Tað er ótrúligt, at fólk ongantíð koma at læra at hava bert eitt vet av frástøðu til tað føroyska, og duga at skilja munin á nútíðar mentan og á søgu. Men enn sum fyrr halda fólk, at ein kabarett skal vera beisk og bert innihalda teiti og vísur um kendar politikarar t.d. P.H. og Kai Normann Andersen hava víst okkum, at atfinningar, radikalitetur, fólksligheit og vísusangur væl kann vera vakur, tankavekjandi og fyltur av kenslum, sum í songum sum hesum: "*I dit korte liv", "Sig de ord", "Den hvide sne" (Mogens Dam), "La Garconne"* (Ludvig Brandstrup). Fara vit til Føroya og taka vit fólkakæru Frændur til dømis, eru hesir nærum pínligir í teirra tjóðskaparromantikki. Hvar er tað ektaða menniskjaliga og júst tað mótið, ið skal til at tosa um okkurt annað enn at vera føroyingur í 80inum? Sum her hjá P.H.:

*"Men engang skal også*
*smerten være slut.*
*Det bli´r endnu hård´re*
*end da glæden bristed´.*
*Det er slemt at se alt*
*fortsat afbrudt,*
*søge trøst i andres leg med*
*det, man misted.*
*Det må man så. Et stille*
*smil,*
*et venligt:*
*Nå"*

*Nå visen*

*"Hold dig vågen ven.*
*Vores lille liv sluttes af*
*med en evig søvn.*
*Vi er af samme stof som*
*drømme gøres af*
*det store tomme rum.*
*Alle som påstår der findes*
*mere,*
*giver os veksler uden*
*underskrift.*
*(…)*
*Menneske blev menneske i*
*kærlighed*
*gjort i elskov blev vi dog.*
*I dit korte liv er det meste*
*spildt*
*(…)*
*Hold dig vågen ven,*
*hvorfor sove nu*
*i den lyse sommernat? Det*
*haster med det kys.*
*Den kommer før du tror,*
*den drømmeløse søvn."*

I dit korte liv.

Hetta er ein sorgblíður vísusiður, ið ongantíð hevði kunnað tikið fram spurningar um at vera "danskur", men bert hetta at vera menniskja. Men hjá okkum er spurningurin enn: "Um ein føroyingur kann fara á vesi, uttan at spyrja, hvat lorturin hevur at siga fyri hann sum føroying".

Oyggjaskeggi og Framin vóru føroysk bløð, ið borðin á tiðarandanna veingjum ósmæðin skrivaðu um Lenin, Marx og Engels – og tá hava loypt øði og eina sanna panikkkenda ræðslu á kommunistaforskrektu Ísrael og Amerika vinalig trúgvandi føroyskar borgarar.

*Framhald á síðu 14*

"Tað, sum vit í dag kunnu sakna í okkara tíð, sum tey høvdu á Framanum, var andi og idealir, sum sett saman við móti og intellektuellum flogi, er slíkt, sum skapar og broytir tíðarrák. At vit kundu fingið ein sterkan avloysara til tjóðskaparromantikkin, í øllum tess formum, um tað so er heimstaðarromantikkur, neo-regionalisma, at vit kundu skolað alt kjak um EIN føroyskan samleika langt burtur, og latið, menniskja komið fram um æviga føroyingin."

**Kim Simonsen, januar 2003**

**Á slóðini á horvnu mentanarradikalu søgu okkara - Framin og Oyggjaskeggi**

*- Nøkur orð um føroyska útiseta blað- og mentanarsøgu 1970-1976.*

*"Fyri at siga tað bart út, so geva vit ikki ein skid fyri hvørki Fólkating ella Løgting. Kanska foreldur okkara ikki hava mist álit teirra á fólksins kosnu monnum, men vit hava langtsíðani mist allar illusiónir um demokratisku mytuna. Tað hevur altíð verið ein myta og tað verður ikki annað (…) Kapitalistiska samfelagið er bara eitt lið í eini søguligari gongd, men søgan steðgar ikki við tí kapitalistiska samfelaginum"*

**Jens Dalsaard, Framin nr. 5. 25 marts 1971**